# B36 eyðmýkti ÍF

**VODAFONEDEILDIN** Við støði í vælskipaðum verjupæli og sera góðum álopspæli vann B36 ein eyðmýkjandi 5-0 sigur í trupla útidystinum í Fuglafirði í gjár. Við sigrinum á ÍF hevur B36 vunnið annan dystin á rað, og anda fuglfirðingar í nakkan, í stríðnum um triðja plássið í Vodafonedeildini

Óalvur Øre Hansen

ÍF 0
B36 5

Tað hevur ikki gingið eftir vild hjá B36 í hesum kappingarárinum, men eftir sannførandi 5-0 sigurin á fuglfirðingum í gjár, er okkurt sum bendir á, at B36 hevur funnið aftur til góðu slóðina frá byrjanini av landskappingini.

– Tað kemur sera væl við hjá okkum at vinna í Fuglafirði. Vit hava havt eitt turbulent kappingarár higartil, men eru nú við at koma fyri okkum aftur, og tað vísa vit við at vinna ein greiðan sigur í Fuglafirði, segði ein sera fegin Sigfríður Clementsen eftir dystin.

Og tey hava alla orsøk at fegnast í B36 leguni eftir sigurin á fuglfirðingum. Tí B36 vísti sera gott fótbóltspæl og skoraðu heili fimm mál, meðan fuglfirðingar onki mótsvar høvdu til væluppløgdu gestirnar, og í seinra hálvleiki spældu heilt uttan mið og mál.

Tískil var tað vónsvikin ÍF venjari, sum eftir dystin mátti ásannað, at avrikið hjá hansara monnum als ikki var nøktandi

– Nei hetta var ein at teimum heilt ringu døgunum, har einki riggaði hjá okkum. Vit fáa als ikki okkara egna spæl at koyra. Tískil bleiv dysturin spældur fullkomuliga uppá teirra premissur, og gjørdi tað sítt til at úrslitið bleiv sum tað bleiv, segði Ábraham Løkin eftir dystin.



SIGANDI MYND

*Christian R. Mouritsen og B36 hava fult tamarhald á liggjandi fuglfirðingunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Bárður legði fyri

Tað var annars ikki nakað, sum bendi á at talan skuld gerast um ein stórsigur til B36, tí tað gekk javnt á frá dystarbyrjan, har bæði liðini høvdu onkran líkinda kjans.

> **Vit hava havt eitt turbulent kappingar, men eru nú við at koma fyri okkum aftur**
>
> SIGFRÍÐUR CLEMENTSEN, B36

Men sum fyrri hálvleikur leið, fingu gestirnir betri tak á miðvøllinum, og hevði tað við sær at teir fingu lagt eitt ávíst trýst á fuglfirðingar, sum høvdu trupult við at fáa samanhang í spælið.

Leikliga yvirvágin gav úrslit í 29. minutti, tá Bárður Olsen legði B36 á odda 1-0, og stutt fyri hálvleik økti Christian R. Mouritsen um leiðsluna, tá hann fekk fótin á bóltin eftir gott innlegg frá lívliga Hjalgrimi Elttør í vinstru síðu.

### Korthúsið rapladi

Eftir steðgin skuldu fuglfirðingar royna at stríða seg inn aftur í dystin, men ístaðin vóru tað gestirnir sum reelt avgjørdu dystin við málinum til 3-0 tíðliga í seinra hálvleiki. Talan var um eina heldur margháttliga støðu, tí linjuverjin vinkaði fyri rangstøðu, tá Høgni Eysturoy eftir trunkaspæl í brotsteiginum, smekkaði bóltin í kassan. Men dómarin brískladi fyri máli, tí ein fuglfirðingur hevði spælt bóltin til Høgna.

Eftir at B36 hevði lagt seg á odda til 3-0, rapladi korthúsið hjá ÍF av álvara, og einasti spurningurin var hvussu nógv mál B36 skuldi at skora.

Tískil var tað fult í trá við dystargongdina, tá fyrst Róaldur Jacobsen skoraði til 4-0, áðrenn Magnus H. Olsen staðfesti eyðmýkingina av fuglfirðingum, við málinum til 5-0 í 85. minutti.

Samanumtikið var sigurin hjá B36 fult uppiborin, hóast 5-0 ljóðar av nógvum. Men uttan at taka nakað frá góða avrikinum hjá B36, so sigur úrslitið eisini nakað um vánaliga avrikið hjá fuglfirðingum.

## Christian R. Mouritsen

# Eg eri sera væl nøgdur

– Vit spæla ein sera góðan dyst í dag, har vit standa sera væl í verjuni, og so riggaði skjóta umstillingsspælið til fulnar í dag, segði ein sera fegin Christian R. Mouritsen, sum skoraði næsta málið hjá ártalsfelagnum.

-Vit vóru uppsettir til dystin, tí vit vildu enda fyrru hálvu væl, og eg haldi at tað sást aftur á vøllinum, har vit stríddust sum eitt lið, og tað legði gróðarbotn fyri góða avrikinum hjá okkum, segði Christian.

Spurdur um hvat stórsigurin hevur at tíða fyri B36, sigur Christian at tað hevur nógv at siga. Ein tílíkur sigur gevur okkum sjálvsálit og trúgv uppá at tað ber til, tí við sigrinum á ÍF eru vit bert trý stig frá triðja plássinum.